# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ísland og vit

Tá tað frættist, at landsstýrið við stuðli frá øllum flokkum á tingi hevði gjørt av at bjóða Islandi eitt gjaldførislán, fegnaðust vit um avgerðina her. Nú er avgerðin um lánið so ítøkiliga sett í verk. Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum og íslendski fíggjarmálaráðharrin, Árni Mathiesen, undirskrivaðu á middegi týsdagin fyribils lánsavtaluna. Avtalað er, at fyrstu fimm árini eru avdráttarfrí og aftaná verður nýggj avtala gjørd um, hvussu lánið skal afturgjaldast. Vit mæltu í oddagrein til, at lánið átti at verið rentu- og avdráttarfrítt í t.d. fimm ár. Hetta er so vorðið til, at lánið verður avdráttarfrítt i fimm ár, og tað kunnu føroyingar bert fegnast um. Hetta lánið til Ísland snýr seg í grundini ikki so nógv um pening, men um myndamál ella symbolikk. Føroyar vilja við hesum sýna Íslandi og heiminum, at vit stuðla brøðratjóðini í eini sera truplari støðu. Landsstýrismaðurin lýsti hesa støðu væl í gjár, tá hann segði, at er tað nakar, sum veit, hvat ein fíggjarkeppa merkir fyri eitt land, so eru tað vit føroyingar. Jóannes Eidesgaard sipar sjálvandi til stóru fíggjar- og búskaparkreppuna síðst í nítiárunum, tá Føroyar mestsum fóru á húsagang. Tann kreppan elvdi til fíggjarligar trupulleikar á øllum økjum: hjá tí almenna so væl sum hjá privatfólki. Hartil komu trupulleikar við sjálvsáliti og sjálvsvirðing umframt mangar aðrar trupulleikar. Vit stóðu rættliga einsamøll tá, so jú, vit vita, hvat hetta snýr seg um.

Íslendski fíggjarmálaráðharrin, Árni Mathiesen, fegnaðist yvir, at Føroyar vístu hetta stórsinni. Hinvegin er spurningurin, hvørt her er talan um føroyskt stórsinni. Er her ikki heldur talan um nakað sjálvsagt og natúrligt? Vit eru so nær Íslandi, og vit hava í øldir livað í lagnufelagsskapi. Spurningurin er, um Hoyvíksáttmálin (Íslandssáttmálin), ikki átti at fingið eitt ískoyti um, at londini hjálpa hvørjum øðrum, um stórir trupulleikar hótta og møguleikarnir eru til tess. Ísland fer at koma fyri seg aftur og verður um nøkur ár at hava stóran og týðandi leiklut í Útnorði og í Norðurlondum.

Uttanríkispolitiskt stendur Ísland á týdningarmiklum vegamóti. Rákið gongur móti ES limaskapi og sama rák er í Noregi. Undir slíkum umstøðum hava Føroyar lítið í at velja uttan at fylgja ættfrændunum fyri vestan so væl sum fyri eystan. Teir eru jú hóast alt okkara størstu kappingarneytar og Føroyar uttanfyri ES við Noregi og Íslandi innanfyri ES má vera eitt sindur av eini skrekkvisjón hjá okkara uttanríkisráðharra, sum óvist av hvørji orsøk tvíheldur um EFTA kósina. Nú er so okkara uttanríkisráðharri á vitjan hjá íslendska starvsfelagnum. Henda vitjan er eitt frálíkt høvi hjá Jørgen Niclassen at kunna seg um ætlanir Íslands við atliti at øllum Europaspurninginum. Hetta mál er á skránni, so forvitnisligt verður at frætta, hvørjar niðurstøðurnar eru. Men umráðandi er, at vit ikki avmarka okkum, tá tað kemur til kunning og vitan um allar møguleikar.

**Sosialurin**

## Eyðgunn sig sannleikan



**ATLI S. JUSTINUSSEN**
býráðslimur

Eftir at hava lisið grein hjá Eyðgunn Samuelsen, har hon leggur eftir undirritaða og Gunvá við Keldu og okkara uppskoti um, at skatturin ikki skuldi hækka, fari eg hervið at gera hesar viðmerkingar.

**Fríðtíðarskúlin**
Eyðgunn sigur, at vit vildu stongja fríðtíðarskúlan. Hetta er als ikki rætt! Eg haldi, at Eyðgunn skuldi sett seg inn í viðurskiftini, áðrenn hon úttalar seg. Vit tóku undir við uppskotinum um, at Fríðtíðarskúlin skuldi húsast í Virkishúsinum. Har kundu vit brúkt ta tænastu, sum vit hava í Virkishúsinum. Hetta hevði spart kommununi 1,3 mió. kr.

**Skatturin**
Eyðgunn vil eisini vera við at, um skatturin ikki skuldi hækkast, so kom tað at hava hópuppsagnir við sær. Eg veit ikki, hvat innlit Eyðgunn hevur í tøl og búskap. Eg kann taka undir við tí, at um tú setir 1 pct. inn í eitt Excel ark, tá er lætt at fáa áleið 6 mió. meiri í inntøku við verandi inntøkugrundarlagi. Men eg kann fortelja Eygunn, at eingin nágreiniliga kann geva svar uppá, um hetta gevur fleiri inntøkur, at við at hækka skattin. Sjálvur haldi eg hetta ikki vera rætt, tí var eg eisini ímóti at hækka skattin. Við at hækka skattin, leggja vit altíð stein oman á byrðu hjá skattaborgarinum.

Tað viðførir størri fráflyting og minni tilflyting til Klaksvíkar Kommunu. Hetta ger eisini tað at eftirspurningurin av húsum verður minni og húsaprísurin lækkar. Og hetta ger kanska eisini tað, at pengastovnarnir vilja fíggja gomul hús, heldur enn at nýggj hús vera bygd.

Við hesum fáa fyritøkurnar í kommununi lítið og einki at byggja. Eg veit um fleiri, sum sigla runt um í heiminum, sum fara at flyta úr kommununi, aðrir fara undir FAS og DIS. Hetta gevr nógv færri inntøkur til kommununa.

Nei, tað kann ongantíð verða lættari at tyngja um byrðarnar hjá okkara íbúgvum. Tey seinastu árini er bæði oljan dýrkað og rentan hækkað nógv, og nú kom eisini ein skattahækking.

Eg fari framhaldandi at arbeiða fyri einum sunnari raksturi av kommununi og at leggja lunnar undir framburð og trivnaði í Klaksvíkar Kommunu.

Hvat valúrslitinum viðvíkir, havi eg ikki annað at viðmerkja enn, at fólkið hevur talað!

www.atli.fo

## Norðurlendski mentanargrunnurin kunnandi fund í Føroyum í november

**Av teimum 26-28 mió krónunum, sum árliga verða játtaðar úr Noðurlendska Mentanargrunninum til mentanarátøk í norðurlondum og uttanfyri norðurlond, eru Føroyar vanliga væl umboðaðar**

Grundarlagið undir játtan og útgjaldi til mentanarátøk úr grunninum eru vanliga, at trý norðurlond skulu verða umboðað í verkætlanini.

Eitt av høvuðsmálunum hjá umsitingini í grunninum er at kunna og vegleiða umsøkjarum so gjølla sum tilber, at umsóknin er so greið, nágreinlig og væl skrivað, sum gjørligt.

Av heildarumsóknum - fyri at taka eitt dømi um árini 2006 og 2007 - var talið á umsóknum ávíkavist 899 og 794 umsóknir á ávíkavist stívliga 118 og 102 mió. krónur. Vanliga verður umleið triðingur av umsóknunum játtaður.

Av umsóknum komu ávíkavist 9 og 10 umsóknir úr Føroyum, sum svara til stívliga 1 prosent. Hvat játtanum viðvíkir, hava Føroyar vanliga verið væl umboðaðar við umleið tveimum prosentum av játtanum úr grunninum.

### Fundir í Tórshavn og Klaksvík

Í november mánaði kemur Thomas Heikkila, málsviðgerði í Mentanargrunninum til Føroya at kunna um grunnin og greiða frá, hvussu fram verður farið, tá søkt verður um pening.

Kunnandi fundir verða í Tórshavn og Klaksvík fyri øll áhugað. **Í Norðurlandahúsinum mikudagin 19. november kl. 13.00 til 16.00 og í Býráðshøllini í Klaksvík 19. november kl. 19.00 til 22.00.**

Á hesum fundum fer Thomas Heikkila at greiða frá Norðurlendska Mentanargrunninum og Urd Johannesen, fer stutt at kunna um grunnin Kulturkontakt Nord.

Fundurin er fyri øll, ið hava brúk fyri at søkja um norðurlendskan pening til mentanarátøk.

Føroysku umboðini eru Urd Johannesen, Norðurlendski Mentanargrunnurin og Jógvan við Keldu, føroyskur limur í grunninum Umboð fyri Kulturkontakt Nord.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.